## Fáa sild inni við land



Íslendsk skip, sum hava fiskað sild á firðunum á Vesturlandinum, hava roynt óvanliga nær landi, tí sildin stendur so innarlaga. Eitt nú hevur sildin staðið inni á Grundarfirði, og nú skriva íslendsk bløð, at á Breiðafirði stendur sildin eisini heilt inni við land. Í vikuni mátti eitt skip biðja um loðs fyri at koma á fiskileið, tí sildin stóð so innarlaga. Skiparar hava eisini kært seg um, at reiðskapurin hevur fingið skaða, tí teir royna so nær landi.

## Fleiri ferðast til Íslands

Altjóða flogvøllurin í Keflavík fær altsamt størri týdning fyri ferðafólkaflutningin millum Ísland og umheimin. Hagtølini vísa, at tíggju teir fyrstu mánaðirnar í ár komu 413.000 ferðafólk til Íslands um vøllin í Keflavík, og er tað 15 prosent fleiri enn somu mánaðir í fjør. Í oktober var talið 6,5 prosent størri enn í oktober í 2006. Hagtølini vísa, at ferðafólkastreymurin úr flestu londum er í vøkstri, og at fólk nú eisini ferðast um várið og um heystið.

# Sjagaklettur sera góða sølu

**P/F Thomson er eitt felag, sum útflytir feskar fiskavørur úr Føroyum. Felagið er dóttirfelag hjá Thomson International í Scrabster. Nú um dagarnar hevði hvalbiartrolarin Sjagaklettur eina sera góða upsasølu hjá hesum felag**



*Sjagaklettur fekk 9 krónur netto fyri kilo av upsa í Scrabster. Tað er sera góður prísur. Skipið fiskaði í fýra dagar og seldi fyri meira enn 800.000 krónur tilsamans*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er áhugavert, tá ið vinnan letur okkum frætta um góðar sólskinssøgur. Soleiðis var nú um dagarnar, tá ið vit frættu frá Ludvík Justinussen hjá P/F Thomson.

Eins og Ludvig setti seg í samband við okkum, eru aðrir/ og onnur vælkomin at gera tað sama, tá okkurt áhugavert rørist í vinnuni.

- Leygardagin var djúpvatnstrolarin Sjagaklettur úr Hvalba hjá okkum í Scrabster. Meginparturin av veiðini var upsi, stívliga 136.000 pund. Skipið hevði umleið 16.000 pund av hvítum fiski aftrat upsanum.

### Óhoyrdur prísur

Ludvík sigur, at Sjagaklettur hevði eina sera góða upsasølu. Nettoprísurin fyri upsan var nevniliga 9 krónur fyri kilo. Hetta má sigast at vera framúr prísur fyri eina heila last av upsa.

- Eg veit ikki um líknandi prísir fyri eina heila last av upsa, hvørki í Føroyum ella Scrabster, og tí má henda sølan hjá Sjagakletti sigast at vera serstakliga góð.

Ludvík Justinussen sigur, at samlaða søluvirði hjá hvalbiartrolaranum hendan túrin var stívliga 800.000 krónur, ið er ein sera góður túrur eftir fýra dagar roynd.

### Hvør er Thomson?

Vit kunnu leggja aftrat, at P/F Thomson er eitt felag sum útflytir feskar fiskavørur úr Føroyum. Felagið er dóttirfelag hjá Thomson International, sum liggur í Scrabster.

Thomson International tekur sær serliga av at landa og selja lastirnar hjá føroykum skipum.

# Nú bragdaði aftur í Klaksvík

**Í vikuni hevur Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík landað fleiri skip, og fleiri línuskip koma eisini inn at landa í morgin. – Hetta kemur ótrúliga væl við, sigur landingarformaðurin**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú kann av røttum sigast, at tað bragdaði ordiliga aftur í Klaksvík. Tað hevur verið heldur slakt við landingum í seinastuni. Fiskiskapurin hevur verið lakur, bæði hjá ísfiskatrolarum og línuskipum. Men nú er líkt til, at batar eru at hóma. Meira fiskur kemur upp á land, og fiskaprísirnir eru framvegis góðir – um enn teir eru eitt sindur skiftandi.

Í morgun landar línuskipið Ågot umleið 90.000 pund, sum teir hava fingið á Íslandsrygginum. Eini 80% av veiðini er toskur, og restin er ein blandingur av øðrum fiskasløgum, har blálongan helst telir mest.

Hetta er ein góður túrur hjá Ågot. Teir seldu um uppboðssluna í gjár, og samlaða søluvirði var yvir eina miljón krónur. Fiskaprísirnir vóru heldur lakari í gjár enn í fyrradagin, men kortini hevði Ågot eina góða sølu.

Ågot hevur havt einar 11-12 setur á hesum túrinum.

Í morgun liggur eisini línuskipið Froya og landar. Teir hava eini 65.000-70.000 pund, sum teir hava fingið á djúpum vatni undir Føroyum. Ein stórur partur av veiðini er longa og brosma.

Froya hevur havt einar 9 setur.

Ísfiskatrolararnir, Nónhamar og Fjalshamar, landaðu eisini í Klaksvík fyrr í vikuni. Teir hava ikki verið langan túr, men vóru at kalla fullir.

Hjá øðrum skipinum var okkurt í ólagi við maskinarínum, men nú er í lagi aftur, og væntandi loysa skipini hvørja løtu.

Aðrir bátar, sum Landingarmiðstøð Føroya hevur landað hesa vikuna, eru trolbáturin Varðin, snelluskipið Havsbrún og línuskipið Skørin.

Í morgin koma fleiri línuskip inn at landa.

-Vit vænta Polarstjørnuna, Helenu, Grana, Fugltúgvuna og ísfiskatrolararnar Safir og Smaragd. At gongd nú tykist vera komin á aftur, kemur ótrúliga væl við hjá okkum øllum, sum eru tengd at fiskivinnuni her norðuri, sigur landingarformaðurin, Pól Fuglø.



*Ågot hevur gjørt ein góðan túr. Teir hava verið á Íslandsrygginum, har 80% av veiðini hevur verið toskur. Í gjár seldi Ågot fyri meira enn eina miljón. Tað er ófør søla*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*